# Tað almenna eigur rættin til vatnið í Sumbiarbergholinum

*Spurningurin um rættin til vatnið í undirgrundini er ikki einfaldur løgfrøðiliga. Verandi lóggáva fevnir um rættin til omanávatn, og gevur tí ikki svar upp á spurningin um, hvør eigur ella hevur rættin til undirgrundarvatn, sigur Finnbogi Arge m.a. í viðmerkingunum til uppskotið um vatnið í Sumbiarbergholinum*



ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til uppskotið hjá vinnumálaráðharranum um vatnið í Sumbiarbergholinum, verður greitt frá, at undir arbeiðinum at spreingja tunnilin til Sumbiar kom Landsverkfrøðingurin á sumri í 1988 í rivut og leyst fjall uml. 1700 metrar inni, har tað lak rættiliga nógv vatn - bara úr tí eina staðnum lóku uml. 160 l/sek. Síðan hava verið áheitanir frá bæði kommunum og privatum um at fáa rættin til vatnið, sum kom úr tunlinum, men ivi hevur verið um spurningin um, hvør hevði rættin til vatnið, og tískil eisini um, hvør kann veita eitt tílíkt loyvi – jarðareigararnir ella tað almenna.

– Spurningurin um rættin til vatnið í undirgrundini er ikki einfaldur løgfrøðiliga. Verandi lóggáva fevnir um rættin til omanávatn, og gevur tí ikki svar upp á spurningin um, hvør eigur ella hevur rættin til undirgrundarvatn. Hetta er eisini ein spurningur um, hvat ognarrætturin hjá jarðareigarum fevnir um, og hvussu langt hann røkkur niðureftir - um nakað mark er.

– Hesin spurningur er ikki svaraður – hvørki í lóggávu, dómsvenju ella løgfrøðiligari teori. Tó hava fleiri rættarlærdir ta uppfatan, at ognarrætturin hjá jarðareigarunum røkkur so langt niður, sum tað higartil kenda vanliga brúkið av ognini hevur kravt.

### Gagnnýta tilfeingið

– Uttan at taka støðu til nevnda spurning generelt, verður mett, at tað almenna eigur rættin til vatnið í Sumbiarbergholinum. Vísast kann á, at higartil er vatn ikki útvunnið beinleiðis úr undirgrundini í Føroyum, og í hesum føri snýr tað seg um vatn, sum rennur í bergholið, sum tað almenna hevur latið gjørt, og sum neyvan hevði komið fyri ein dag, um bergholið ikki varð gjørt. Tað verður tí ikki mett, at slík lóg hevði gjørt inntriv í verandi rættindi hjá jarðareigarum.

– Fyri at fáa eina greiða heimild til at geva privatum ella øðrum rætt til at gagnnýta hetta tilfeingið, verður tó mett, at tað er ráðiligast við serligari lóggávu á økinum, soleiðis at landsstýrismaðurin fær eina lógarfesta heimild til hetta. Somuleiðis skal lógin áseta tey atlit, sum skulu takast, tá loyvi verða givin, sigur Finnbogi Arge m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

# Álitini klár í dag

*Efir fundin hjá uttanlandsnevndini í dag kann landsstýrið vænta sær at fáa áltini til ríkisrættarligu samráðingarnar*

JOHN JOHANNESSEN

Nógv fundarvirksemi var í gjár millum ymisku umboðini í uttanlandsnevndini. Umboðini fyri Fókaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin fundaðust í sínum lagi, meðan umboðini fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin fundaðust í sínum lagi.

Orsøkin til stóra fundarvirksemið var, at uttanlandsnevndin miðar eftir at hava álit klár at leggja fyri landsstýrið eftir fundin í dag.

Nevndin hevur ásannað, at tað ikki ber til at finna nógv umtalaðu breiðu semjuna, og tí arbeiða samgongan og andstøðan hvør í sínum lagi um at skriva álit.

### Samgongan samd

Seinnapartin mikudagin og fyrrapartin í gjár sótu Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum, Eyðun Viderø úr Fólkaflokkinum og Jákup Sverri Kass úr Sjálvstýrisflokkinum og royndu at orða eina kladdu til eitt álit, allir tríggir flokkarnir kunnu taka undir við.

Tá Sosialurin tosaði við samgongumenn um middagsleitið í gjár gekst hetta arbeiðið væl, og menn vóru vísir í, at tað fór at eydnast at gera eitt endaligt felags álit millum teir tíggjar flokkarnar.

Samgonuflokkarnir høvdu á middegi í gjár enn ikki viðgjørt kladdur sínar til álitið saman við Miðflokkinum, men tó væntaðu teir, at tað fór at bera til at fáa Miðflokkin at vera við í einum felags áliti.

Hesum sýnist møguleiki eisini vera fyri, tí Jenis av Rana hevur gjørt púra greitt, at hann heldur, at vit eiga at lata landsstýrið fara til samráðingar við donsku stjórnina um ein sáttmála, ið fyrst løgtingið og síðani fólkið kann taka undir við, tá hann fyriliggur.

### Samdir um ríkisfelagsskapin

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin skuldu hittast í gjárkvøldið at finna út av, um tað fór at bera til at semjast um eitt felags álit.

Hesum høvdu uttanlandsnevndarlimirnir báðir, Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum og Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum báðir góðar vónir um.

Sambandsflokkurin fegnast um samtykt Javnaðarfloksins frá eykalandsfundinum leygardagin, og er vísur í, at tað fer at bera til at finna fram til eitt felags tilmæli so leingi flokkarnir báðir eru samdir um ríkisfelagsskapin.

Men ríkisfelagsskapurin er eitt hugtak, ið ógvuliga torført er at staðfesta, og tí halda samgongufólk, at Javnaðarflokkurin eisini kann førka seg nærri samgonguni og vera við í einum áliti saman við samgonuni.

Somu áskoðan hevur Miðflokkurin, og segði Jenis av Rana við Sosialin í gjár, at funnu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin saman um eitt felags álit, var nógv umtalaða breiða semjan fingin undir land. Tí tá hevði Javnaðarflokkurin nevniliga megnað at drigið Sambandsflokkin við á sjálvstýriskós.

Hesum eru kortini hvørki javnaðarfólk ella sambandsfólk samd við. Men tey vænta kortini, at flokkarnir báðir finna saman um eitt álit, ið mælir til at tryggja føroyingum ríkisfelagsskapin og sostætt vælferðina.

Miðflokkurin sigur seg eisini leggja stóran dent á at tryggja vælferðina, men hann heldur ikki, at hon kemur í vanda av ætlan landsstýrisins um at samráða seg til nýggjan sáttmála við donsku stjórnina. Tí stuðlar hann helst álitinum hjá samgongufokkunum.

Tískil fær landsstýrið eftir øllum at døma í dag eitt álit frá samgonguflokkunum og Miðflokkinum og eitt frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum.

## Sjúka hjá arbeiðsleysum veksur munandi

Fleiri og fleiri í Danmark vísa arbeiðstilboðum aftur, tí at tey eru sjúk. Sjálvt um talið á arbeiðsleysum tey seinastu 2 árini hevur verið fallandi, so eru málini, har arbeiðsleys siga nei til arbeiðstilboð orsaka av sjúku, tvífalda.

Tá ið arbeiðsleys hava fingið sjúkradagpengar í meira enn eitt ár, skulu tey til eitt sokalla »rådighedscheck« hjá A-kassanum, har møguleiki er fyri, at tey missa dagpengarnar og verða flutt yvir til forsorgarlógina hjá avvarandi kommununi. Av tí sama, hava bæði kommuna og A-kassi áhuga í at tey arbeiðsleysu halda seg undir markinum og fáa vanligar dagpengar, áðrenn tíðarfreistin er úti. Og tað náa stórt sæð øll.

99% av teimum arbeiðsleysu sum fáa sjúkradagpening, hava eina samanlagda sjúkufráveru, sum liggur beint undir markinum uppá 1 ár. Fáa tey sjúkradagpening í 1 ár leingist áramálið í A-kassanum við 10 mánaðum og satsurin á dagpengum og sjúkradagpengum í Danmark er tann sami.

Úrslitið er, at ikki fyrr enn fólkini verða kallað til arbeiðis finnur Arbejdsformidlingen (AF) út av, at tey als ikki eru tøk á marknaðinum, av tí at tey eru sjúk, og tá fella tey yvir í sjúkradagpeningaskipanina. Hetta er ein fittligur máti at útseta aktiveringina.

Øll arbeiðsleys skulu av røttum boða a-kassanum frá um tey gerast sjúk og ikki eru tøk á arbeiðsmarknaðinum. Men í veruleikanum hevur tað ongar fylgjur, um tú ikki gert tað, av tí at sjúka verður góðtikin sum galdandi orsøk fyri ikki at taka av arbeiðstilboði.

**(Kelda: Vinnuhúsið)**



# Vísur í góðari ráðgeving

*Høgni Hoydal sigur seg einki hava frætt um, at uttanlandsnevndin fer at handa landsstýrinum álit í dag, men hann væntar holl og greið ráð, tá tey koma*



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum*

JOHN JOHANNESSEN

– Tá álitini koma frá uttanlandsnevndini, rokni eg við greiðum útmeldingum um, hvørjir trupulleikarnir í einstaku punktunum í uppritinum eru.

Høgni Hoydal er sannførdur um, at uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar hevur fingið holla viðgerð í uttanlandsnevndini, og er hann vísur í, at ráðini í álitinum ella álitunum fara at hjálpa landsstýrinum almikið, tá endaliga samráðingaruppleggið skal orðast.

### Beinagrindin er klár

Høgni Hoydal sigur, at landsstýrið hevur gjørt sær eina beinagrind til eitt endaligt samráðingaruppl egg, men verður hetta ikki liðugt skrivað fyrr enn uttanlandsnevndin hevur handað landsstýrinum álit síni.

Um álitini verða latin landsstýrinum eftir fundin í uttanlandsnevndini í dag, dugir Høgni Hoydal einki at siga um. Men hann sigur seg skilja á lagnum, at nevndin er farin undir at orða álit.

– Vit fara sjálvandi at lurta eftir teimum ráðum, vit fáa í álitunum, og somuleiðis fara vit at laga endaliga samráðingaruppleggið eftir álitunum, sigur Høgni Hoydal.

### Skal framhaldandi ráðgeva

Tá landsstýrið er liðugt at orða endaliga samráðingaruppleggið, fer málið aftur í uttanlandsnevndina at venda, áðrenn hol verður sett á samráðingarnar. Sambært Høgna Hoydal, er uttanlandsnevndin tá aftur vælkomin at mæla til broytingar í endaliga samráðingaruppleggin um, og verða hesar eisini framdar.

– Uttanlandsnevndin skal sleppa at flyta hvørt komma, um tað er tað, hon vil, leggur Høgni Hoydal dent á.

Men tíðin, uttanlandsnevndin fær til hetta, er avmarkað, tí landsstýrið hevur biðið donsku stjórnina um samráðingar í seinnu hálvu av mars.


REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir

# KUNNGERÐ

## um úrslit av vali av Umboðsráðið fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

Víst verður til lýsing í bløðunum fyrrapart av januar mánaði í ár um val til Umboðsráðið fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar.

Inn komu í alt 16 uppskot um valevni. Av hesum 16 komu 2 uppskot ov seint, 2 uppfyltu ikki treytirnar fyri uppstilling, og ein tók uppstilling sína aftur.

Sostatt vóru 11 valevni eftir, sama tal, sum skulu veljast.

Sambært viðtøkum okkara § 11 stk. 6 fellur valið burtur, um uppstillaðu valevnini ikki eru fleiri enn tey, sum standa fyri vali, og verða hesi at rokna sum vald.

**Tey 11, sum eru vald, eru:**

Marin í Dali, Tórsbyrgi 101, 100 Tórshavn
Jógvan Durhuus, 350 Vestmanna
Hervør Guttesen, 386 Bøur
Trygvi F. Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn
Atli Hansen, 512 Norðragøta
Birgir Waag Høgnesen, 350 Vestmanna
Tummas Jakobsen, Spógvavegur 6, 100 Tórshavn
Gudmund Mortensen, 800 Tvøroyri
Klæmint Olsen, Vesturgøta 14, 100 Tórshavn
Jógvan L. Rasmussen, á Frælsinum 8, 100 Tórshavn
Súni Vinther, Hvarvið 1, Box 33, 110 Tórshavn

Valið er galdandi í fýra ár, og valskeiðið verður sambært viðtøkunum § 8 stk. 3 roknað frá endanum av tí regluliga aðalfundinum í tí árinum, har tey eru vald.

**Tórshavn, tann 22. februar 2000**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel+298 345600
Fax+298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355